**Avtala millum Fíggjarmálaráðið og Tænastumannafelag Landsins um dagpening**

## Ferðing innanoyggja

**§ 1**. Starvs- ella tænastumaður, sum fer tænastuferð, sum varir longri enn 4 tímar og er longri burtur enn 10 km. frá tænastustaðnum ella er sjóvegis, fær dag- og tímapening, harundir náttarviðbót.
*Stk. 2.* Tænastustaðurin er, um ikki annað er fyrisett, arbeiðsstaðurin, ið er ávíst tænastumanninum (skrivstova, tollbúð, útskiftingarbygd o.t.), soleiðis at 10 km markið verður roknað haðani.
*Stk. 3.* Dagpeningur verður roknaður fyri hvørt samdøgur, sum tænastumaðurin er burturstaddur. Er tænastuferðin styttri enn 16 tímar, verður tímapeningur roknaður fyri hvønn ásettan tíma. Er hon longri, verður dagpeningur latin.
*Stk. 4.* Náttarviðbót verður veitt fyri at hava ligið nátt burtur frá tænastustaði, hevur arbeiðsgevarin ikki ávíst honum innivist. Náttin verður roknað til 8 tímar.
*Stk. 5.* Full viðbót verður veitt upp í 28 dagar. Fyri longri tíð verður viðbótin sett niður.
*Stk. 6.* Rindar landskassin tænastumanni úti kost og innivist eftir nærri fyrisettum treytum, fær hann ikki dag- og tímapening.

**§ 2.** Eftir frammanfyri tilskilaðu reglum verður dag- og tímapeningur fyrisettur soleiðis:

| | |
|---|---|
| Tímapeningur | kr. 15,00 |
| Fullur dagpeningur | kr. 250,00 |
| Hartil verður veitt náttarviðbót eftir rokning, tó í mesta lagi | kr. 650,00 |
| Náttarviðbót, ikki skjalprógvað | kr. 230,00 |
| Lækkaður dagpeningur, heruppií náttarviðbót | kr. 212,00 |
| Av hesum náttarviðbót | kr. 106,00 |

## Ferðing uttanlands.

**§ 3.** Stovnsleiðslan skal geva loyvi til tænastuferðir uttanlands (ferðaloyvi).

**§ 4.** Fyri tænastuferðir til Danmarkar er dagpeningurin kr. 360 um dagin, eisini heimferðardagin.
*Stk. 2.* Fyri tænastuferðir uttanfyri ríkið verða reglurnar hjá uttanríkisráðnum nýttar.
*Stk. 3*. Full viðbót verður veitt upp til 28 dagar. Fyri longri tíð skal verða gjørd avtala um viðbót í hvørjum einstøkum føri.
*Stk. 4*. Reglan í § 1, stk. 6 er eisini galdandi fyri ferðing uttanlands.

**Felags reglur**

**§ 5.** Av dag- og tímapeningi skal tænastumaður rinda kostarhald og innivist. Útreiðslur av ferðapeningi við skipi, flogfari, bussi o.t. verða endurgoldnar eftir rokning. Tænastumaður hevur skyldu til, í tann mun tað er gjørligt, at nýta almenna ferðasambandið.
*Stk. 2.* Útreiðslur fyri telefon verða endurgoldnar, um telefonsamrøðurnar eru tænastuligar.
*Stk. 3.* Fyri innivist á hotelli í Danmark verður goldið eftir rokning, tó í mesta lagi tær upphæddir í tí til eina og hvørja tíð galdandi **"Vegleiðing til ferðauppgerð fyri tænastuferðir uttanlands."** frá Fíggjarmálaráðnum, Lønardeildini.

**§ 6.** Er tænastumaður, sum hevur rætt til dagpening, á skeiði ella líknandi, har matur er roknaður í skeiðgjaldið (ella innbjóðing), hevur hann bara rætt til 40% av dagpeninginum. Eru ikki allar máltíðir roknaðar við í gjaldinum, verður drigið frá dagpeninginum soleiðis: fyri døgverða 30% og fyri nátturða 30%. Er gisting roknað við í gjaldið fyri skeiðið, hevur tænastumaðurin ikki rætt til náttarviðbót ella endurgjald fyri hotell.

**§ 7.** Henda regla kemur í gildi frá 1. mars 2013. Samstundis fer avtalan um dagpening frá 1. mars 2006 úr gildi.

*Argir tann 5. februar 2013*

*Tænastumannafelag Landsins*

Meinhard Gaardlykke

*Fíggjarmálaráðið*

Jørgen Niclasen

/

Snorri Fjallsbak